# Kjak



**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*
*Strendur*

## Mugu finna aðrar orkukeldur

Eg skrivaði, fyri eini tíð síðani, ein greinastubba um hitapumpur og varandi orku. Onkursvegna havi eg orðað meg ógreitt, tí eg havi fingið nógvar viðmerkingar frá fólki, sum hava misskilt greinina. Lat meg tí sláa fast, at endamálið við greinini var ikki at siga, at hitapumpur eru ein vánalig orkuloysn fyri tann einstaka brúkaran.

Tað sum eg vildi hava fram í greinini var, at tað er sera umráðandi, at arbeiðið við at leggja um frá olju til varandi orku, sleppur at halda fram.

Tað var í tí sambandinum, at eg segði (sum eitt dømi), at ein hitapumpa, sum fær el-orku úr einum oljutanga á Sundi, er í roynd og veru eitt annað slag av oljufýring. Tað kann gott vera, at talan er um eina effektiva oljufýring fyri brúkaran, men framvegis skal hon hava olju, fyri at kunna virka, og hækkar oljuprísurin, so verður hon dýrari í rakstri.

Tað er tí í fínasta lagið, at fólk fáa sær hitapumpur, og uttan iva kunnu tey spara pengar við tí. Men onkursvegna er henda orkuloysnin ikki fullfíggjað, fyrr enn vit fáa ein størri part av el-framleiðsluni úr varandi orkukeldum.

Hanus Vang skrivaði, sum eina viðmerking til mín, at ein partur av el-nýtsluni, sum ein hitapumpa nýtir, er framleiddur úr varandi orku, og tí skal tað eisini takast við í roknistikkið, men so einfaldur er veruleikin ikki.

SEV framleiðir eina ávísa mongd av el-megi úr vatni og vindi, og henda mongdin verður ikki broytt av, at fólk keypa sær eina hitapumpu. Tað vil siga, at øll el-nýtslan, ið er omanfyri tað, sum SEV klárar at framleiða úr varandi orkukeldum, verður framleidd 100% úr olju (eisini galdandi fyri ta orkuna, sum føðir hitapumpurnar).

Bert 29 prosent av føroysku el-framleiðsluni í 2010 var grundað á varandi orku. Tí er sera umráðandi, at arbeiðið við hesi menning sleppur at halda fram. Annars verður tað bara ein spurningur um tíð, til vit fáa eina nógv størri el-rokning.

Lat meg so eisini undirstrika, at eg havi við hesum ikki tikið støðu til, um orkuútbyggingarnar hjá SEV, altíð hava verið rættar. Tað er ein heilt annar spurningur. Men fyri føroyska samfelagið er sera umráðandi, at vit flyta okkum burtur frá oljuni og fara meira yvir til at nýta varandi orku.



**Jónleif Johannesen**
*Klaksvík*

## Skilagóður almennur samferðslureformur

Í dag gjalda allir føroyingar og øll vinnulívsrekandi fyri at koma til Havnar. Øll uttan tey, ið búgva á Eysturoynni og Streymoynni. Vinna og fólk á hesum oyggjum sleppa undan at rinda fyri sínar vælútbygdu ferðamøguleikar. Góðar breiðar vegir, lýsandi tunnlar og nýumvalda brúgv. Hesi øki eiga at verða javnstillað við útjaðaran.

Vit eiga at gera ein almennan samhaldsfastan reform, sum umfataðar alt ferðslukervið í Føroym, tað veri seg á landi, undir landi og á sjónum. Tann berandi tankin er, at vit tá verða fleiri, sum lyfta. Hendan skipan átti at fevnt um øll tunnilsgjøld, eisini komandi Sandoyar og Skálafjarðatunnulin, og ferðagjøld við ferðamannaskipum.

Vit eiga at knýta Norðoya, Vága, Norðskála og Kollfjarða tunlarnar saman við ferðamannaskipunum. Alt í eina skipan. Skipanin skal virka á tann hátt, at bilurin bert verður skrásettur einaferð um dagin. T.v.s. at tað kostar tað sama at koyra gjøgnum allar tunlarnar, sum tað kostar at koyra gjøgnum ein og hevur tú goldið í einum tunnli, er ferðabáturin ókeypis. Hinvegin eru tunlarnir ókeypis, um tú hevur goldið umborð.

Ein slík skipan hevði lækkað og javnstillað prísirnar føroyingurin má gjalda fyri at brúka vegakervið. Ein slíkur reformur hevði verið fólki og vinnulivinum í Føroyum at frama. Eisini kundi hann veri trygdin fyri at bæði Sandoyar og Skálafjarðatunnulin blivu framdir í verki innan hóskandi tíðarbil.

## Skeiv mynd

**Í blaðnum mánadagin prentaðu við eitt lesarabræv hjá Egili Petersen í Sandavági. Tíverri er skeiv myndin komin í blaðið - myndin var av einum øðrum Egil Peteresen í Kvívík. Vit biða báðar umbera okkum mistakið!**

**blaðstjórin**



**Dagfinnur Danbjørg**

## Mótstríðandi áhugamálini í ABC mugu broytast til felags áhugamál í CEDH

Og hetta letur seg einans gera í eini komandi samgongu, ið hevur fólksins vælferð og trivnað fyri eyga, og sum setur og heldur fasta kós móti málinum.

Hetta eiga CDE og H at gera, og fyrireikingarnar eiga teir at leggja upp til skjótast til ber, soleiðis at tað gerst ein sjálvfylgja, at teir eftir næsta val gera samgongu.

Tað er ikki til at skilja, at Javnaðarflokkurin blívur við at samstarva við Fólkaflokkin, tí Fólkaflokkurin varð stovnaður fyri at knúsa Javnaðarflokkin, og tað hann upprunaliga stóð fyri, og honum hevur eydnast at knúsa hugsjónirnar, meðan flokkurin higartil hevur fingið loyvi at liva sum eitt hím og sum ein skuggi av sær sjálvum, tí í dagligdegnum sær tað út sum um, at pláss í stjórnini hevur verið nøktandi hjá javnaðartingfólkunum fyri at fara í samgongusamstarv. Javnaðarhugsjónirnar hava nærum ikki verið til at fáa eyga á. Fyri tað kundu teir sitið í andstøðu ella heima við hús.

Og tað er komið so langt, at Jóannes hevur gjørt fascistaleiðarans - Benito Mussolini - orð um, at stættastríðið er av, til síni, og í tí sambandinum, so skilji eg, at hann kann samstarva við ein høgraradikalan, kryptofacsistiskan, kapitalistiskan yvirklassaflokk, ið - hóast mong orð - einans hevur havt og framvegis hevur eitt mál fyri eygað dag og nátt, og tað er at nøra seg og síni fíggjarliga og í starvssetanarhøpi. Alt annað er lótur og orðavavstur fyri at leiða uppmærksomheitina frá teimum aktuellu ránunum, teir eru í ferð við at fremja til eina og hvørja tíð. Teirra lótur á frælsisleið eru væl avdúkaðar bæði í - 46 og aftur - eg haldi tað var í 2002, so vil mann frælsi í fíggjarligum høpi fyri hin einstaka ella fyri landið sum heild, so eigur mann at halda seg so langt sum væl møguligt frá hesum flokki.

Tað var tann tíð, tá Sambandsflokkurin hýsti sosialliberalum politikarum, sum vildu vera við til at fremja nøkur munagóð stig fólki og landi at frama, men tað sær út til at vera ein farin tíð, og flokkurin er vorðin ein konservativur flokkur, sum livir við kunstigum andadrátti upp á lánta tíð við stuðli úr teirra sjálvvalda móðurlandi vælvitandi, at skeið teirra er runnið, tann dagin nalvastongurin verður kliptur, og at tað helst fer at vera innan fyri tey komandi 10 til 15 árini. Men hetta fer ongin flokkur at avgera, tí tað er og verður einans fólkið, sum kann taka nevndu avgerð, og soleiðis eigur tað altíð at vera: Við fólkinum, fyri fólkið og saman við fólkinum fyri føðilandinum nú og forever.

Eisini tí er tað alneyðugt at saðla um, og at stríðast dag og nátt saman við fólkinum, so kósin kann vera sett soleiðis, at hon í mest møguligan mun gagnar fólki og landi - ikki bara í dag, men eisini inn í eina ókenda framtíð.

CDEH og vit mongu, ið vilja tað besta fyri land og fólk og ikki bert fyri okkum sjálvi, mugu taka lógvatak saman, seta kós móti javnrættindum, brøðralagi og frælsi.

Standa vit framhaldandi - ein og ein - í skeivum flokki og samstarvi, verða vit útnyttað og feld.

Bert saman standa vit sterk og kunnu røkka málum, ið vit higartil hava hildið vera ómøgulig at náa. Latum okkum gera tað.